Karl Jacob Sigvards

# Gudstænasta við kingosa



*Karl Jacob og systurin, Fía Christiansen, sum í dag er 92 ára gomul. Tey eru tey einastu, ið eru eftir á lívi av systkjunum*



*Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, heilsar upp á føðingardagsbarnið*



*Sóknarpresturin Emil Olsen heilsar uppá Karl Jacob Sigvardsen*



*Karl Jacob Sigvardsen saman við synunum, f.v.: Hans Jacob, Petur Jacob og Ásfinn±*

**Sunnudagin 27. februar var stórt hátíðarhald við Gjógv í samband við, at Karl Jacob Sigvardsen fylti 100 ár**

HÁTÍÐARHALD

*Orð: Magnus Gunnarsson*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Umleið 400 fólk leitaðu sær til Gjáar seinasta sunnudag, tá enn ein 100 ára føðingardagur var í bygdini, sum er tann fjórði í røðini seinastu umleið 30 árini.

Hátíðarhaldið byrjaði kl. 12 við kirkjugongd, har Emil Olsen sóknarprestur prædikaði. Tjørnuvíkingar, ið høvdu kingosang í kirkjuni, settu ein serligan hátíðarligan dám á gudstænastuna.

Klokkan 13.30 bjóðaði kommunan øllum, sum ynsktu at heilsa upp á Karl Jacob, til døgurða í Gjáar Samkomuhúsi. Eftir døgurðan var kaffi á Gjáargarði.

Til føðingardagshaldið vóru umboð fyri fleiri almennar stovnar. Tey, sum hildu røðu, vóru. Jóannes Eidesgaard, løgmaður, Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, Petra Johns-